

# REYÐA KROSS VINIR

- Soleiðis kanst tú stuðla tilflytara ella tilflytarafamilju í gerandisdegnum

# VÆLKOMIN

Sum tilflytari ella flóttafólk í Føroyum kann tað vera trupult at trívast, og at gerast ein virkin partur av samfelagnum og av teimum felagsskapum, sum knýta okkum saman til dømis á arbeiðsplássi, í skúla ella í frítíðarlívi.

Tí er tørvur á sjálvbodnum sum tær. Tín nærvera og samvera men eisini títt netverk, tínar royndir og tín kunnleiki til samfelagsbygnað, føroyskar siðvenjur og reglur, er gull vert fyri ein tilflytara ella eitt flóttafólk, sum saknar eitt sosialt netverk ella skal venja seg við eina nýggja tilveru í Føroyum.

Tað eru ikki bara flóttafólk og nýkomnir tilflytarar, sum tørva eina hjálpandi hond. Fleiri av teimum tilflytarum, sum hava búð í Føroyum í longri tíð, sakna sosial sambond í sínum nærumhvørvi.

Tí hava vit Reyða Kross Vinir. Saman kunnu vit veita familjum ella einstaklingum við tilflytara- ella flóttafólkabakgrund møguleikan at koma í samband við lokalar familjur ella einstaklingar við tí endamáli at økja um sosiala netverkið hjá tilflytarum og flóttafólkum, og harvið stuðla teimum í at falla til, at læra mál og mentan, at støðast og trívast betur.

**Hjartaliga vælkomin sum sjálvboðin Reyða Kross Vinur og takk fyri ta tíð, tú nýtir til at hjálpa øðrum.** →

# INNIHALDSYVIRLIT


| | |
|---|---|
| **Vælkomin** | **2** |
| **Tín leiklutur sum sjálvboðin** | **5** |
| **Eitt javnsett vinalag** | **13** |
| **Hvat kunnu tit gera saman?** | **16** |
| **Um málið er nýtt ella torført** | **22** |
| **Á fundi við skúla, kommunu ella myndugleika** | **27** |
| **Ansa eftir tær** | **30** |
| **Sjálvboðin stuðul røkkur ikki altíð** | **32** |
| **Skeið** | **34** |
| **Um vinalagið endar** | **37** |
| **Samband og ávísingar** | **38** |



# TÍN LEIKLUTUR SUM SJÁLVBOÐIN

**Reyða Kross Vinir eru sjálvboðin, ið eru vinir ella vinafamilja hjá tilflytarum í Føroyum. Tilflytarar kunnu eisini vera flóttafólk. Tilflytarar verða hereftir eisini nevnd vinur ella vinafamilja.**

Í høvuðsheitum er tín leiklutur sum sjálvboðin vinur at veita góða samveru og stuðul. Endamálið er at veita medmenniskjum tokka og at veita einum tilflytara stuðul og hjálp á einum sjálvbodnum grundarlagi.

Tú kanst gera stóran mun fyri hesi fólkini. Tú tosar málið, kennir umhvørvið, føroysku mentanina og føroyska samfelagið. Bara tað ger, at tú kanst hjálpa við einari rúgvu av gerandisavbjóðingum, og vera við til at opna dyr til nýggj sosial sambond.

Sum sjálvboðin hevur tú ein heilt serligan leiklut. Tú ert til staðar fyri at læra eitt menniskja at kenna og hjálpa tí uttan at fáa pening afturfyri. Slíkt samband skapar álit, sum ikki kan samanberast við tey sambond, sum tilflytarin hevur við myndugleikapersónar.

**Einsemi og avbjóðingar**

Kanningar vísa, at tilflytarar og flóttafólk eru í størri vanda fyri einsemi og sosialari avbyrging enn aðrir samfelagsbólkar. Tey eru komin til eitt fremmant land, har tey allarhelst ikki skilja málið. Tey eru flutt burtur frá sínum sosiala netverki, sum tey hava bygt upp gjøgnum lívið - vinum, kenningum, grannum, skúlafeløgum, starvsfeløgum o.s.fr.

Eisini flóttafólk og tilflytarar, sum hava verið í Føroyum í fleiri ár, kunnu hava avbjóðingar. Tað kann vera trupult hjá teimum at fáa eitt sosialt netverk í Føroyum, at skilja málið, at fáa eitt gott starv og finna útav, hvussu ein er virkin í tí føroyska samfelagnum.

**Soleiðis verða tit sett saman**
Ein sjálvboðin vinur ella vinafamilja verður sett saman við einum vini ella vinafamilju.

Virksemisleiðari hjá Reyða Krossi hevur ábyrgdina av at seta teg saman við einum vini ella vinafamilju, og verður tað í størstan mun við støði í onkrum, ið tit hava til felags, eitt nú áhugamál, aldur, bústaðarøki, aldur á børnum og tílíkt, umframt tørvinum hjá luttakaranum.

Síðani eru tað tit, ið saman skapa karmarnar um samveruna tykkara millum.

Sjálvboðin kunnu altíð venda sær til virksemisleiðaran ella skrivstovuna hjá Reyða Krossi, um ivamál eru.

**Hvussu nógva tíð skalt tú seta av?**
Vit viðmæla, at tit beinanvegin tosa um, hvussu ofta tit ynskja at hittast.




“Eg hevði búð í Havn í 6 ár. Men tá eg flutti við manni mínum út á bygd, føldi eg, at eg skuldi byrja heilt av nýggjum. Fyrsta árið á bygd kendi eg meg øgiliga einsamalla og avbyrgda, tí eg ongan kendi, og umhvørvið var heilt nýtt fyri meg. Tí teknaði eg meg til Reyða Kross Vinir, tá onkur segði mær frá átakinum”

— Ligia úr Meksiko —

Nógv hittast ímillum tvær til fýra ferðir um mánaðin. Tað avgera tit sjálvi/ar/ir tykkara millum. Lurta eftir ynskjunum hjá viðkomandi og ver realistisk/ur viðvíkjandi, hvussu nógva tíð tú hevur til taks. Tað er sera óheppið, um tú eftir stutta tíð mást frámelda teg, tí tú hevur verið ov framsøkin. Hav í huga, at vinurin eisini kann hava ein gerandisdag við knappari tíð.

Um tykkara tíð er knøpp, ber til at gera gerandisuppgávur saman, t.d. at keypa inn ella matgera saman; ymiskt, ið tit allíkavæl brúka tíð uppá. Seinni í heftinum fært tú ítøkilig hugskot um, hvat tit kunnu gera saman, og hvørjum tú kanst stuðla við.

**Hvat fært tú burturúr at vera sjálvboðin vinur ella vinafamilja?**
Tey allarflestu uppliva gleði av at hjálpa øðrum menniskjum, men at vera sjálvboðin fevnir ikki bert um at geva. Sum sjálvboðin fært tú eisini møguleika at læra eitt menniskja við eini aðrari mentanarligari bakgrund at kenna, sum kann ríka títt lív og víðka tín sjónarring.

Tú kanst fáa innlit í eitt annað mál, eina aðra mentan og ein annan livihátt. Tú kanst vera tann hepni gesturin til ein leskiligan døgurða, ella tú kanst hjálpa við at gera leskiligir rættir, sum tú ongantíð áður hevur roynt. Tað kann eisini henda, at tú upplivir, at tit ikki eru so ymisk, sum tú møguliga helt.

Tær fyrstu ferðirnar, tit hittast, eru tit sjálvsagt ikki vinir, men tað gerast tit kanska við tíðini. Um tit hóast alt ikki fáa eitt siðbundið vinalag, sum tíðin líður, so gevur sambandið tykkara millum ofta allíkavæl nýggj perspektiv á tilveruna og víðkar tín sjónarring.

**Hvat verður væntað av tær?**
Tað verður væntað, at tú ert tøk/ur við tíni vitan, royndum og møguliga tínum netverki. Tú hjálpir við tí, tú hevur møguleika og hug til. Vit vænta, at tú setur teg inn í endamálið við Reyða Kross Vinum, men at tú tekur útgangsstøði í tørvinum og ynskjunum hjá tínum vini ella vinafamilju.

Tað er ikki nakað, sum tú skalt gera, og tær nýtist ikki at vita nógv um t.d. lóggávu og familjusamanføring, rættindi og skyldur ella um almennar skipanir. Tú skalt ikki taka ein myndugleikaleiklut á teg, og tað er heldur ikki tín uppgáva at vera sálarfrøðingur. Men um vinurin hevur brúk fyri stuðli til ávís viðurskifti, sum tú ert før/ur fyri at hjálpa við, so ert tú vælkomin at hjálpa við slíkum, sum tú vanliga hevði gjørt fyri vinir ella familju. Minst bert til, at tú ert til staðar sum eitt medmenniskja, og ikki sum eitt starvsfólk.

Tað verður tó væntað, at tú stuðlar vininum at klára avbjóðingarnar sjálv/ur. Tú ert til staðar, og kanst stuðla við hjálp til sjálvhjálp. Royn at loysa trupulleikar við vininum, og ikki fyri vinin. Tað kann vera trupult, tí tað tekur ofta longri tíð. Men í longdini loysir tað seg betur fyri báðar partar.

**Sig frá og vís víðari**
Um tú metir, at vinurin hevur tørv á meira hjálp, enn tú kanst veita, so ger vart við tað á ein virðiligan hátt.

Tú kanst og skalt ikki loysa allar avbjóðingarnar, sum persónurin møguliga hevur. Snýr tað seg til dømis um løgfrøðiligar spurningar, so sum um familjusamanføring ella uppihaldsloyvi, skalt tú vísa víðari til serkøn (sí yvirlit síðst í faldaranum). Tú kanst eisini hjálpa teimum at seta seg í samband við rætta felagsskapin ella myndugleikan.

Boða eisini vininum virðiliga frá, um tú metur, at hann/hon setur órímilig krøv. Tað kann eitt nú vera um tíð, gávur, døgurða ella um at vera tøk/ur. Vit mæla til, at tú, sum sjálvboðin, vendir tær til virksemisleiðaran fyri sparring um møguligar avbjóðingar.

Les meira í pørtunum **"Ansa eftir tær"** og **"Sjálvboðin stuðul er ikki altíð nokk"**.

## ENDAMÁLIÐ VIÐ REYÐA KROSS VINUM

Reyða Kross Vinir arbeiða miðvíst fyri, at fleiri fólk við tilflytarabakgrund klára at fóta sær og falla til í føroyska samfelagnum.

Okkara grundarlag er tað persónliga sambandið millum sjálvboðin og einstakling ella familju við tilflytarabakgrund.

Tey sjálvbodnu stuðla teirra vini ella vinafamiljum við gerandisavbjóðingum og eru við til at víðka sosiala netverk teirra, sum kann økja um teirra trivna og kenslu av at hoyra til í føroyska samfelagnum.



*Gyða hevði ikki nakra ávísa væntan, tá hon teknaði seg sum Reyða Kross Vin. Hon vónaði bara, at hon kundi vera ein hjálp.*

“ Eg haldi, at tað er treytað av persónunum, man hittir, og hansara ella hennara væntanum. Og so tekur man tað har frá. Tí onkur hevur kanska tørv á hesum og onkur annar á hasum.

Sjálvt um tað ikki kann samanberast, um tú ert flýdd undan kríggi, so kenna fleiri av okkum kensluna av at vera tann nýggi í einum fremmandum landi. So hví ikki hjálpa, um tú kanst. Um tú bara hevur eitt sindur av tíð at geva av. Og sum sjálvboðin fært tú eisini nógv burturúr ”

**— Gyða, sjálvboðin vinur —**

# GÓÐ RÁÐ

**til eina góða byrjan**

- Gerist samd um, fyrstu ferð tit hittast, hvussu langa tíð tit brúka saman, hvussu ofta tit hittast og hvussu tit fáa fatur á hvørjum øðrum.
- Greið vininum frá, hví tú vildi gerast Reyða Kross Vinur, og spyr vinin, hví hon/hann ynskti at fáa ein Reyða Kross Vin. Tosið saman um, hvat tit vænta ella ynskja at fáa burtur úr vinalagnum.
- Tak stig til at hittast, heldur enn at bíða eftir, at vinurin tekur stigið. Minst til, at tú ert á heimavølli og hevur helst meira yvirskot.
- Syrg fyri, at tað ikki gongur ov long tíð ímillum, at tit hittast í byrjanini. Ger altíð eina avtalu um, nær tit hittast næstu ferð, áðrenn tit siga farvæl.
- Ver opin, lurta og spyr fyri at finna útav, hvat tú kanst gera fyri at hjálpa.
- Ver forvitin, um okkurt er, sum tú ikki skilir.
- Hav gott tol.
- Um tey koma frá kreppuraktum økjum, so ikki byrja við at tosa um evni, sum kunnu vera traumatiserandi, so sum kríggj. Ein góð tummilsregla hesum viðvíkjandi er, at um tey sjálvi nevna kríggj ella aðrar hendingar, so er allarhelst í lagi at tosa um tað.
- Um tit ivast í onkrum, so set teg í samband við virksemisleiðaran ella skrivstovuna hjá Reyða Krossi, og so kunnu vit práta saman um møguligar avbjóðingar.



# EITT JAVNSETT VINALAG

Hóast talan ikki er um eitt vinalag frá fyrsta degi, so er tað ein grundhugsjón um vinalag, sum liggur handan hendan háttin at hjálpa, umframt ein ætlan um, at sambandið skal vera so javnsett sum gjørligt.

Hugsa um hetta sambandið, eins og tú hugsar um aðrar vinir og kenningar, har tit í felag gera av, hvat tit skulu gera saman, og tit kanska skiftast um at leggja hús til. Grundleggjandi snýr tað seg um at royna at skilja og viðurkenna hvønn annan, tí ongin dámar at kenna seg illa ella órættvíst viðfarnan.

**Gávur og peningur**

Gávur eru ein natúrligur partur av nógvum sosialum sambondum, eitt nú millum vinir, starvsfelagar, í skúlanum og í familjuni. Vit geva gávur fyri at vísa takksemi og umhugsni. Um tit velja at lata gávur, ber til at avtala eina hóskandi upphædd, so misskiljing ikki stendst av hesum. Tað kann eisini vera gott at hugsa um, hvussu tit kunnu gera okkurt stuttligt saman, til dømis fara útferð, uttan at tað kostar nógv. Vit viðmæla tykkum, at tit ikki lata pening ímillum tykkum, tí tað kann føra til óneyðugar ósemjur.

**Tá okkurt er, sum tú ikki skilir**

Vit hava øll ymiska bakgrund. Tað kann hugsast, at tað í hesum sambandi eru mentanarligar, átrúnaðarligar ella politiskar siðvenjur hjá hvørjum øðrum, sum tit ikki heilt skilja. Tað besta ráðið vit kunnu geva er, at tú roynir at vera opin og greiðir frá, hví tú gert tað, sum tú gert. Og at tú samstundis torir at vera forvitin og spyrja vinin, um tað er okkurt, tú ivast í.



“ Tey eru faktiskt sum ein eyka familja fyri okkum, vit síggja tey sum ein part av familjuni ”

— Armgarð og Sverri, sjálvbodnir vinir —

“ Eg visti ikki heilt, hvat eg fór at gera sum Reyða Kross vinur, men eg havi lært, at man nýtist ikki at vera líka sum persónar fyri at vinalagið skal rigga.

Mann lærir nógv av hvørjum øðrum, og tað er spennandi at fáa nýggj perspektiv uppá ymisk viðurskifti, hóast vit ikki altíð eru samdar ”

— Katrin, sjálvboðin vinur. —

# HVAT KUNNU TIT GERA SAMAN?

Tað er heilt upp til tykkum sjálvi, hvat tit ynskja at gera saman. Tað veldst um, hvat tit hava hug til, hvørjum tørvur er á, um tit hava familju og børn, o.s.fr. Tað, sum hevur týdning, er samveran og stuðulin. Og minst til, at tann besta hjálpin er hjálp til sjálvhjálp, tí tað styrkir um virkisførið og sjálvsálitið hjá vininum.

**Gerandisdagurin**
Uttan mun til, um tilflytarin er nýggjur í Føroyum, ella hevur búð her í longri tíð, so hevur hann ynskt at fáa ein Reyða Kross Vin, tí honum tørvar hjálp at trívast í Føroyum.

Tað, sum kanska kennist púra natúrligt fyri teg, kann vera trupult fyri ein persón, ið júst er komin til Føroya ella ein, ið kanska ongantíð er fallin til í føroyska samfelagnum. Tað kunnu vera praktisk gerandisviðurskifti, so sum at brúka Samleikan og Vangan, bíleggja tíð hjá lækna ella at skilja brøv frá myndugleikunum (sum kunnu vera á føroyskum og donskum).

Tørvur kann eisini vera á grundleggjandi vitan um, hvussu samfelagið hongur saman, til dømis innan heilsuverkið, skal mann ringja til kommunulæknan ella sjúkrahúsið fyri at verða koppsettur? Nær ringir mann til **112**, **114** og **1870**?

**Kanska tú kanst geva íblástur til, hvussu ein góður gerandisdagur hongur saman, tá bæði mamma og babba arbeiða**:

Hvør smyr matpakkarnar, og hvør heintar børnini?

Hvørji krøv setur barnagarðurin ella skúlin?

Spurningarnir kunnu vera nógvir, og tú hevur helst staðið við nógvum av teimum sjálv/ur, ella tú kennir onkran sum hevur.





“Fyrstu ferð eg fór í bindiklubb, hevði eg tikið tógv og stokkar við, tí at eg helt, at onkur fór at læra meg eitt sindur at binda. Tá fann eg útav, at tað er meira prátið og køkurnar, sum eru í fokus”

— Ligia úr Meksiko —

**Dagstovnar og skúlar**
Um børn eru í familjuni er vitan um dagstovnar og skúlar viðkomandi. Bæði dagstovnar og skúlar eru nógv meir enn bara ansing og útbúgving. Tað er eisini har, at børn mennast, búnast og hitta børn úr øðrum umhvørvum. Í skúla og dagstovni kunnu børnini spegla sær í og læra av øðrum børnum.

Fyri foreldrini er dagstovna- og skúlalívið hjá børnunum eisini ein góður møguleiki at koma inn í nýggjar felagsskapir. Í teimum yngru flokkunum eru ofta føðingardagar, felagstiltøk, foreldrafundir o.a. Tosa saman um, hvussu umráðandi tað er at luttaka í tiltøkunum. Harumframt kunnu tað vera nógv skúla-foreldrasamstørv og samskiftishættir, sum foreldur hava fyri neyðini at vita um.

Hvør er munurin á felags foreldrafundi og foreldraviðtalu? Hvussu fær man fatur á flokslæraranum? Og hví skulu børnini til heilsufrøðing? Tosa um, hvussu umráðandi tað er at hava gott og regluligt samband við lærarar og námsfrøðingar.



**Útbúgving og arbeiði**
Tíbetur fáa fleiri tilflytarar arbeiði. Tó kann tað, av ymsum orsøkum, vera torført hjá tilflytarum at fóta sær á føroyska arbeiðsmarknaðinum, eisini eftir nógv ár í Føroyum. Ein góð hjálp kann kanska vera at hjálpa við at skriva umsókn, lívsrensl, finna starvslærupláss ella arbeiði.

Tað er eisini møguligt, at tørvur er á at finna útav, hvat fyri útbúgving er tann rætta fyri viðkomandi. Tú hevur helst eitt størri netverk enn tilflytarin. Tú kennir møguliga eisini fólk í nógvum ymiskum størvum og við ymiskum útbúgvingum, sum kann vera hent í hesum sambandi. Um tú ikki ert før/ur fyri at hjálpa við slíkum sjálvur, kanst tú hjálpa við at vísa víðari til ALS ella Vegleiðingarstovuna.

Tað kann vera torført at skilja mentanina og gerandislívið á føroyska arbeiðsplássinum, og hvørjar væntanir eru til hvørt einstakt starvsfólk. Tað kann tí krevja tíð og stuðul at fáa uppbygt sær ein sjálvstøðugan starvssamleika og eitt nøktandi arbeiðslív. Her kanst tú, sum sjálvboðin, stuðla við at greiða frá nøkrum viðurskiftum, eitt nú um barnsins

1. og 2. sjúkradag, fakfeløg, lønarseðil og tílíkt. Tað kann hjálpa at spyrja um arbeiðsmentanina í heimlandinum fyri at skilja, hvat kundi verið øðrvísi, og hvat er trupult við føroysku arbeiðsmentanini. Tín leiklutur kann eisini vera at eggja tínum vini til at halda fast í arbeiðinum, hóast tað í fyrstu atløgu kann tykjast trupult.

**Ver virkin saman við øðrum**
Tað er eitt gott hugskot at vera virkin saman við øðrum í nærumhvørvinum. At vera virkin saman við øðrum, kann bæði vera gevandi fyri tykkum, og tað kann vera við til at víðka um netverkið hjá tínum vini.

Tú kanst eitt nú bjóða tínum vini vælkomnum í tína familju, í tín vinaskara ella bjóða honum við í ein felagsskap, sum tú ert partur av. Men tú kanst eisini stuðla vininum at finna aðrar felagsskapir í tykkara øki og vísa, hvussu vinurin kann sleppa upp í.

Harafturat kunnu tit hittast við øðrum sjálvbodnum og luttakarum í Reyða Kross Vinum. Reyði Krossur skipar tíðum fyri felags tiltøkum fyri vinunum og teimum sjálvbodnu.

Tá fært tú beinleiðis boð. Fylg eisini við á heimasíðuni og sosialu miðlunum hjá Reyða Krossi, har almenn tiltøk, t.d. opið hús og málkafé, verða kunngjørd.

Tit eru eisini vælkomin at finna uppá og skipa fyri felagstiltøkum. Um tú hevur okkurt hugskot, so ert tú vælkomin at seta teg í samband við virksemisleiðaran.



## **HUGSKOT** TIL, HVAT TIT KUNNU GERA, TÁ TIT HITTAST

**Í frítíðini**
- Far ein gongutúr í nærumhvørvinum
- Keyp inn, ger mat og et saman
- Tosa um tykkara mentanir og siðvenjur
- Bjóða í føðingardag, bindiklubb ella til onnur hátíðarhald
- Far ein túr, íðka ítrótt ella spæl okkurt spæl saman
- Les tíðindabløð, hygg eftir sjónvarpi ella føroyskum sendingum saman

**Praktiskur stuðul**
- Les og greið frá brøvum frá myndugleikunum, og far møguliga við til fundir sum hjásiti
- Ger skúlating og ven føroyskt saman
- Tosa saman um útbúgving og arbeiði
- Greið frá skúlaskipanini, sjúkrahúsverkinum, Almannaverkinum og øðrum stovnum og skipanum.

**Virksemi í nærumhvørvinum**
- Stuðla vini tínum við at fáa samband við fólk t.d. í ítróttarfelagi og far til møguligar royndartímar saman
- Bjóða vini tínum við í títt egna netverk, bæði privat og professionelt
- Tak lut í felagstiltøkum saman við øðrum tilflytarum og sjálvbodnum og/ella tak stig til at skipa fyri einum felagstiltaki
- Vitja søvn og søgulig/mentanarlig støð saman

> Tað er týdningarmikið at ikki leggja ov stórt trýst á við ávísum hugburðum. Har skal vera rúm fyri, at man kann vera tann man er
>
> — Katrin, sjálvboðin vinur hjá Ligiu —

# UM MÁLIÐ ER NÝTT ELLA TORFØRT

At tosa og skilja føroyskt er avgerandi fyri at kunna gerast ein virkin partur av føroyska samfelagnum. Fólk, sum júst eru komin til landið, hava tørv á hjálp til at læra málið. Tað sama er galdandi fyri fleiri, sum hava búð her í longri tíð. Hjá summum tekur tað longri tíð enn hjá øðrum. Hav í huga, at tað er torført at læra eitt nýtt mál.

**Um tit uppliva málforðingar**

**Hav tol.** Føroyskt er eitt torført mál at skilja og læra.

**Tosa sakta og einfalt.** Torfør orð eru torfør, sjálvt um tey úttalast sakta. Brúka einfalt mál.

**Brúka amboð.** Sí listan á næstu síðu.

**Ver virkin.** Onkuntíð er lættari at samskifta, tá man t.d. gongur ein túr.

**Málundirvísing**
Tilflytarar og flóttafólk hava møguleika at læra seg føroyskt á ymiskan hátt, eitt nú á kvøldskúla, í appum, við at hyggja í sjónvarp, lurta eftir útvarpi og við at tosa við onnur. Tilflytarar hava sera nógvar ymiskar bakgrundir, og tí er tað eisini ymiskt, hvussu skjótt ella lætt tey læra nýggj mál. Móðurmál, aldur, útbúgvingarstig, lívsroyndir, sálarlig heilsa og persónligir førleikar, hava avgerandi týdning fyri, hvussu lætt ella torført tað er hjá fólki at læra føroyskt. Hav eisini í huga, at uttan mun til hvørjari bakgrund fólk koma frá, so er tað sera avbjóðandi og krevjandi at læra eitt nýtt mál.

**Tað hjálpir at venja**
Kanningar vísa, at sjálvboðið integratiónsarbeiði er nakað sum í stóran mun stuðlar málførleikanum hjá flóttafólkum og tilflytarum. Tað tekur tíð at læra eitt nýtt mál, men jú meira mann tosar, lurtar og venur, jú skjótari lærir mann. Minst til, at tín vinur ella vinafamilja møguliga ikki tosa føroyskt við nakran annan enn teg og kanska á málskeiðum, sum tey luttaka á. Málið hjá tínum vini ella vinafamilju mennist við at verða brúkt. Tí er tað ein sera stór hjálp, um tit tosa føroyskt og t.d. gera heimaarbeiði saman. Fyri summi er tað ein tryggleiki at hava onkran at spyrja um hjálp við heimaarbeiði. Hendan stuðulin kanst tú helst veita. Tit kunnu eisini blaða í bløðum og bókum saman og tosa út frá myndum, sum tit síggja. Líka sum við ymiskum øðrum, so er tað týdningarmikið at vegleiða tínum vini ella vinafamilju, uttan at gera tað fyri tey.

**Tosa so nógv sum gjørligt**
Tað er týdningarmikið, men eisini torført at gerast kønur í føroyskum. Støðið á málinum hevur ávirkan á, hvat tit megna at tosa um – tað kann vera, at tit megna at práta um veður, ymiskt tit síggja o.til., ella tit megna at tosa um álvarsom evni. Støðið mennist jú eisini so við og við, og minst til, at allar samrøður eru venjing og stuðla uppundir málmenningini. Tit kunnu eisini keypa inn saman, og venja nøvnini á vørunum í handlinum. Tit kunnu ganga túr og venja orðini á ymsum, sum tit síggja.

Hav í huga, at tað hjálpir at tosa í stuttum og einføldum setningum, serliga um málið er nýtt fyri tey. Tað riggar ikki at tosa seint um tú samstundis brúkar orð, sum eru lang og torskild.

Um vinurin hvørki tosar føroyskt, enskt, ella annað mál, ið tú tosar, er appin Google Translate hent. Google Translate kann ikki brúkast til føroyskt, men til flest onnur mál, so sum danskt og enskt. Tað kann vera, at tín vinur brúkar onkra aðra app, tí tað finnast fleiri ymiskar appir, ið kunnu nýtast til samskifti á ymiskum málum.

**Málkafé**

Sjálvboðin hjá Reyða Krossi skipa fyri málkafé regluliga. Á málkaféunum er møguligt hjá tínum vini ella vinafamilju at venja føroyskt í óformligum umstøðum, og er tí eitt gott høvi fyri tey, ið vilja venja málið meira og samstundis hitta nýggj fólk. Fylg við nær og hvar málkaféir eru á sosialu miðlunum, sí niðanfyri.



*Gyðja og Sofía læra Olenu og Olgu eitt nýtt orð, hvørja ferð tær hittast. Olga er hárðfríðkari, so í seinastuni hava tær lært orð, sum hava við hetta yrkið at gera.*

“Tær spyrja okkum, minnast tit hvat orð vit høvdu seinast? Hvussu eitur short hair á føroyskum? Og so noyðast vit altíð at hugsa okkum um eina løtu, sigur Olena og flennur”

— Olena úr Ukraina —

## AMBOÐ AT LÆRA FØROYSKT

Appin “Míni fyrstu orð”

Sprotin: www.sprotin.fo

Faroese Online: www.faroeseonline.com

Microsoft Translator: www.bing.com/translator

Faroe Islands Translate: www.faroeislandstranslate.com/

Brúka Youtube - eitt nú “Learn Faroese with Bergur”: www.youtube.com/channel/UCbajkmKrDOvaHhvut7FHq9w/videos

Málkafé hjá Reyða Krossi, sum sjálvboðin skipa fyri: www.facebook.com/malkafefo ella malkafe_fo á Instagram

“Faroese 101” á Instagram

Ymiskt tilfar hjá Snar, Føroyskt sum annaðmál: www.snar.fo/foeroyskt-sum-annadmal Læn eitt nú Krabbabøkur ella “1000 góð orð” á bókasavninum.



## Á FUNDI VIÐ SKÚLA, KOMMUNU ELLA MYNDUGLEIKA

Tú kanst sum sjálvboðin fara við sum hjásitari tá vinurin skal á fund við t.d. skúla ella myndugleika. Tá tú fert við sum hjásitari, fert tú við sum eyka eygu og oyru fyri tín vin, men tú mást ikki gerast partur av sakini. Tað, sum er sera umráðandi, er, at tú ert bert við fyri at tryggja, at alt verður skilt og ført fram.

At vera hjásitari merkir, at man stuðlar persóninum áðrenn, undir og aftaná fundin. Ein hjásitari kann tí eisini hjálpa við at fyrireika fundin og at tosa saman aftaná.

Sum sjálvboðin vinur hjá tilflytara, kanst tú, sum hjásitari, vera stór hjálp og ein dyggur

stuðul. Summi kenna seg ótrygg í sjálvari støðuni, meðan onnur hava trupult at minnast ella skilja tað, ið sagt verður. Minst til, at tú sum sjálvboðin hevur tagnarskyldu um viðurskifti, tú fært innlit í.

**Hjálp til hjásitara**

Summi sjálvboðin kenna seg ikki trygg í leiklutinum sum hjásitari, ella meta ikki, at tað var tað, tey teknaðu seg til sum sjálvboðin. Tað er avgjørt í lagi, um tú ikki ynskir at vera hjásitari. Tú kanst eisini stuðla vini tínum við at hjálpa at finna ein hjásitara. Tit kunnu venda tykkum til virksemisleiðaran um hetta.

❝ Sofía vísti mær á eitt starvsfólk á Vegleiðingarstovuni, sum vit kundu tosa við, og so høvdu vit ein fund saman, har vit fingu høvi at spyrja um, hvørjar møguleikar vit hava her ❞

— Olena úr Ukraina —

❝ Ja eg helt, tað var betur, at tær tosaðu við eina serkøna, tí eg veit kanska okkurt, men eg kenni ikki til alt økið ❞

— Olena úr Ukraina —



# VEGLEIÐING
## TIL YMISK VIÐURSKIFTI

**Løgfrøðilig vegleiðing**
Halt teg frá at geva løgfrøðiliga vegleiðing og vís heldur víðari til onnur, ið hava fakliga vitan (sí listan aftast í faldaranum).

**Sjálvboðin avtala og trygging**
Tín virksemisleiðari biður teg skriva undir sjálvbodna avtalu, ið greiður frá tínum leikluti og skyldum sum sjálvboðin. Tá tú skrivar undir sjálvbodnu avtaluna ert tú tryggjað/ur í tínum sjálvbodna arbeiði.

**Barnaváttan**
Virksemisleiðarin biður teg eisini undirskriva samtykki til at innheinta barnaváttan, um vinurin hjá tær hevur børn.

**Fráboðanarskylda**
Sum sjálvboðin ert tú fevndur av vanligari fráboðanarskyldu eins og aðrir borgarar í Føroyum. Hetta merkir, at tú hevur skyldu at boða myndugleikunum frá, um tú upplivir, at trivnaðurin ella trygdin hjá einum barni er hótt. Tosa við tín virksemisleiðara, um tú sært tekin um mistrivna ella ótryggleika hjá barninum, og fá vegleiðing til, hvat tú kanst gera.

**Tagnarskylda**
Tú hevur tagnarskyldu um tey persónligu viðurskiftini, tú fært innlit í sum sjálvboðin.

# ANSA EFTIR TÆR

Sum sjálvboðin Reyða Kross Vinur, kann tað henda, at tú hittir menniskju í truplum støðum, og tað kann vera torført. Eins og vit onnur, kann vinur tín verða merktur av sorg, strongd, trauma, fíggjarligum og praktiskum avbjóðingum. Sum sjálvboðin vilt tú fegin hjálpa, og kann tað vera ein góð uppliving fyri teg.

Tað er tó umráðandi at ansa eftir sær sjálvum/sjálvari og ikki at taka allar uppgávur og byrðar á egnar herðar. Summar trupulleikar ber ikki til at loysa. Hav í huga, at tú gert mun bert við at vera til staðar og at lurta.

**Set mørk og sig frá**
Tú kanst uppliva, at tú verður møtt/ur við alt ov stórum væntanum. Tað er t.d. ikki tín ábyrgd, at vinurin fær eitt starv, ella at hann sleppur undir útbúgving. Sig tí skjótt og greitt frá, um tú upplivir eitt trýst ella eitt ynski, ið tú hvørki kanst ella skalt ganga á møti. Minst til, at tað er eisini ein hjálp at vísa á, ella at finna onnur, ið kunnu hjálpa.

Tín nýggi vinur kann somuleiðis velja at siga frá ella takka nei til tína hjálp. Tað er umráðandi, at tit góðtaka og virða tørvin hjá hvørjum øðrum, og at tað kanska er ymiskt, hvussu tit siga frá. Summi sjálvboðin hava upplivað at taka ov nógv á seg, og tað kann til tíðir vera trupult at finna út av, hvar markið skal vera. Ver tilvitaður um hetta, ver ikki bangin fyri at siga frá. Hetta ger teg avgjørt ikki til ein 'vánaligan' vin.

Tað er týdningarmikið, at vinabandið er gevandi fyri báðar partar. Tú ert ikki til nakra hjálp fyri teg sjálva/n ella nakran annan, um tú ovbyrðar teg. Um tú hevur trupult við at seta mørk, so set teg í samband við virksemisleiðaran, sum kann geva tær vegleiðing.

**Leita tær sparring**
Vit eggja til, at tú sum sjálvboðin leitar tær sparring hjá tínum virksemisleiðara, tá tú hevur tørv á tí. Somuleiðis viðmæla vit, at tú tekur lut í tiltøkum, sum virksemisleiðarin skipar fyri, tí tað er har, tað er møguligt hjá tær og øðrum sjálvbodnum at deila tykkara royndir og hugskot.





## MENTANARMØTI

**Veðurlagi**
Tær flenna, tá tær minnast aftur á ta fyrstu ferðina tær hittust, stutt eftir at Olena og Olga vóru komnar til Føroya. Tað var ein kaldan dag í mars, og tær høvdu avgjørt at ganga ein hugnaligan túr við Svartafoss. Gyða og Sofía høvdu kaffi og te við. Men túrurin gjørdist stuttur, tí Olena og Olga vóru øgiliga kaldar. Gyða og Sofía høvdu latið seg í vetrarklæðir, meðan Olena og Olga høvdu latið seg í várlig klæðir, tí vit vóru í mars mánaða og sólin skein. "Og minnast tit hin dagin, tá vit fóru oman í fjøruna? Vit høvdu ikki avtalað tað, men vit søgdu 'áh í dag er gott veður' – tað er soleiðis vit noyðast at gera í Føroyum", sigur Sofía. "Ja tað hava vit lært. Nú minnast vit til at fara út, um sólin skínur", sigur Olena og flennur.

**Siðvenjur**
Í páskafrítíðini vóru Olena og Olga við Sofíu og Gyðu og teirra familjum í summarhúsi. "Ja har var øll familjan hjá Sofíu og øll familjan hjá Gyðu. Og har var siðbundin matur...." og so flenna tær hart, og Gyða sigur, at hon helt, at tær vóru øgiliga djarvar at royna ræsta kjøtið.

Tær lærdu ikki bara um føroyskan mat á túrinum, men eisini um føroysk páskir, og Gyða og Sofía lærdu um ukrainskar páskasiðvenjur. Tær flenna, tá Olena greiður frá, at tær málaðu og rullaðu páskaregg, tí hetta høvdu tær ongantíð áður sæð nakran gera. Tær flenna allar í skellilátri, tá Olena sigur, at um hon hevði sæð fólk rulla páskaregg, áðrenn hon lærdi, at hetta hjá okkum er púra vanligt, so hevði hon nokk hildið, at tey vóru í ørviti.

# SJÁLVBOÐIN STUÐUL RØKKUR IKKI ALTÍÐ

Tá virksemisleiðarin hevur innleiðandi samrøður við tilflytaran, verður mett um, hvørt tilflytarin er egnaður at fáa ein sjálvbodnan Reyða Kross Vin. Tað kann tó henda, at ein tilflytari, ið tykist vera hampiliga væl fyri, seinni vísir seg at hava tørv á øðrvísi tilboði enn hesum ella afturat hesum. Tað er umráðandi, at tú setur teg í samband við virksemisleiðaran, um tú upplivir, at tín vinur hevur tørv á serligari hjálp, eisini um tú ert í iva.

Tað kann eisini vera, at tú gerst varug/ur við sosialar trupulleikar, t.d. størri ella áhaldandi ósemjur ella misnýtslu, ið ger, at tað kann vera tørvur á professionellari hjálp. Set teg í samband við tín virksemisleiðara, um tú upplivir hetta.

Tá tú kanst stuðla - eisini hóast tað er torført
Tað kann henda, at tú kemur í samband við ein tilflytara, ið upplivir ella hevur upplivað sorg, strongd ella trauma, hvørt tað er hent í Føroyum ella áðrenn viðkomandi kom til Føroya. Um so er, kann tað vera, at viðkomandi hevur hug at tosa um tað, eins og tað kann vera, at viðkomandi ikki vil tosa um tað. Hav virðing fyri báðum.

Sum sjálvboðin kanst tú gera stóran mun við at geva ró og tryggleika við tíni nærveru og samveru. Tað kann tó krevja treystleika til tíðir. Ver tilvitað/ur um, hvørt tú megnar at rúma støðuni og tørvinum hjá vini tínum. Um tú ikki megnar at rúma støðuni og tørvinum hjá vini tínum, sig honum og virksemisleiðaranum frá á ein virðiligan hátt. Um tú megnar at rúma eini truplari støðu hjá vininum, so set teg inn í viðkomandi viðurskifti, og boða virksemisleiðaranum frá. Saman kunnu tit finna viðkomandi tilfar um eitt nú trauma og hvussu tú best stuðlar vininum.

Minst tó til, at tað ongantíð er tín uppgáva at vera viðgeri. Um tað er tørvur á professionellari hjálp, mást tú vísa víðari til tað.



**Um tú upplivir, at vinurin saknar familju sína**
Nógv fólk, sum eru flýdd undan kríggi, hava mist sambandið við síni kæru. Nøkur hava verið noydd at fara frá familju í økjum, har tað er torført at samskifta, tí tað er kríggj. Onnur eru flýdd heimanífrá saman við sínari familju, men eru blivin skild sundur á leiðini. Tey, ið sakna sína familju, liva ofta í stórari stúran og við skuldarkenslu um, at tey liva trygt samstundis sum lagnan hjá familjuni er ótrygg. Tú kanst hjálpa við at lurta eftir teirra søgu.

Reyði Krossur hevur eisini eina leitanartænastu - les meira her: rødekors.dk/tracing. Um tín vinur hevur tørv á hjálp at finna ella at fáa samband við familju, kunnu tit seta tykkum í samband við skrivstovuna hjá Reyða Krossi, tel. 283630 ella redcross@redcross.fo.

“ Tað er gott at vita, at vit altíð kunnu ringja til Reyða Kross, tí vit fáa ikki hjálpt við øllum. Um vit ivast í onkrum, so hjálpir virksemisleiðarin okkum, til dømis við at finna rætta persónin, sum kann hjálpa.

Ja akkurát, tað er ikki soleiðis at vit eru púra einsamallar um tað heila. ”

— Gyða og Sofía, sjálvbodnir vinir —

# SKEIÐ

Sum sjálvboðin kanst tú hava bæði spurningar og ivamál í vinalagnum við ein tilflytara. Tú kanst eisini uppliva, at tú fært eyguni upp fyri onkrum nýggjum og spennandi, sum tú fegin vilt vita meira um. Av tí sama miðar Reyði Krossur eftir at útvega viðkomandi tilfar, bæði í pappírformi, á netpallum og á skeiðum, har fakfólk deila nýggja vitan og geva íblástur, samstundis sum tú sum sjálvboðin fært ítøkilig amboð til at skilja og handfara avbjóðingar, tú kanst uppliva í vinalagnum og í gerandisdegnum.

Reyði Krossur Føroya bjóðar bæði fysisk skeið og skeið á netinum í samstarvi við danska ella íslendska Reyða Kross. Harafturat eru fleiri talgild skeið, ið liggja tøk á netinum.

Tað er virksemisleiðarin ella starvsfólk hjá Reyða Krossi, sum skipa fyri skeiðum. Boð verða givin, tá skeið verða fyriskipaði. Um tú hevur hugskot til onnur skeið, set teg í samband við virksemisleiðaran, sum kann kanna møguleikarnar fyri at bíleggja ella skipa fyri skeiðum.

Øll niðanfyri nevndu skeið eru ókeypis.

**Fysisk skeið**
Øll sjálvboðin í Reyða Krossi Føroya hava møguleika at taka skeið í kropsligari og sálarligari fyrstuhjálp. Vit viðmæla øllum at taka hesi skeiðini. Skipað verður fyri almennum skeiði nakrar ferðir árliga. Lýst verður á Facebook og á heimasíðuni www.redcross.fo/fyrstahjalp. Tú ert eisini vælkomin at tosa við virksemisleiðaran ella skrivstovuna, um tú vilt sleppa á skeið.

**Talgild skeið**
Sum sjálvboðin hevur tú atgongd til ymisk talgild skeið frá Reyða Krossi. Skeiðini eru tá á donskum ella enskum. Skeiðini eru ymisk til longdar, eru ókeypis og tú kanst taka tey nær sum helst.

- Vælkomin sum sjálvboðin í Reyða Kross (danskt): elearning.drk.dk/introkursus/
- At stuðla, tá lívið er trupult (danskt): fabo.org/rodekors/atstøttenårlivetersvært
- Eitt lív í útlegd (danskt): fabo.org/rodekors/liv-i-eksil
- Menniskjatokki í verki (danskt): elearning.drk.dk/medmenneskelighed-i-praksis/
- Sálarlig fyrstahjálp (danskt): fabo.org/rodekors/PsykiskFørstehjælp
- Soleiðis verja vit børnini (danskt): fabo.org/rodekors/boernebeskyttelse

Eisini skipar Reyði Krossur við hvørt fyri ymiskum viðkomandi skeiðum í samstarvi við danska og íslendska Reyða Kross.

Mit Røde Kors
Sum sjálvboðin hjá Reyða Krossi Føroya kanst tú eisini fáa atgongd til talgilt tilfar og skeið á Mit Røde Kors (www.mitrodekors.dk). Spyr virksemisleiðaran um atgongd til Mit Røde Kors.

Dansk Flygtningehjælp hevur eisini ymiskt viðkomandi tilfar, sum kann stuðla tær í leiklutinum sum Reyða Kross Vinur. Ymiskt tilfar til sjálvboðin er tøkt á www.frivillig.drc.ngo/for-dig-der-er-frivillig.

IFRC Psychosocial Centre hevur nógv góð filmsbrot um sálarliga fyrstuhjálp. Tú kanst síggja filmsbrotini her: www.pscentre.org/multimedia/video/trainings.
Tú ert vælkomin at seta teg í samband við skrivstovuna, um tú hevur áhuga fyri øðrum skeiðum ella hevur uppskot til onnur skeið.

“ Vit hittast við Gyðu og Sofíu, og tær eru ein stór hjálp fyri okkum, soleiðis at vit vita, hvussu vit skulu gera hetta og hatta. Vit eru glaðar fyri at fáa hjálp við okkara pappírum, við Almannaverkinum o.s.fr. Vit ganga eisini túrar saman, hyggja í handlar og bara uppliva nýggj støð. ”

**— Olena og Olga úr Ukraina —**

> “ Vit vilja viðmæla øllum hetta, sjálvandi. Tað er øgiliga gott at hava vinir. Okkum dámar væl at hitta nýggj fólk og læra okkurt nýtt. Ja, vit eru øgiliga glaðar fyri at hava vinir her. ”

— Olena og Olga úr Ukraina —

> “ Eg hevði ikki nakrar væntanir um at fáa nakað burturúr, men tað er altíð gott at tosa við fólk úr øðrum londum. Tá tú hittir nýggj fólk, lærir tú altíð okurt nýtt.
> Tað er ein góð kensla, at tað eg geri, sjálvt um tað er lítið, er ein hjálp. Tí eg síggi tað ikki, sum hetta er at gera nógv. ”

— Sofía, sjálvboðin vinur —

> “ Nei nei, tað sum tit gera...
> tit hava gjørt so nógv fyri okkum. ”

— Olena úr Ukraina —

# UM VINALAGIÐ ENDAR

Tað er natúrligt at vinalagið tykkara millum broytist. Møguliga hevur vinalag tykkara í høvuðsheitum snúð seg um praktisk viðurskifti, sum hevur við sær, at tað við tíðini ikki er neyðugt at hittast. Tað kann eisini vera, at tit eru vorðin so mikið tøtt, at tit ikki longur nýtast at vera við í Reyða Kross Vinir.

Tað kann eisini henda, at sambandið tykkara millum ikki riggar, og at kemi'in ikki er serliga góð. Kanska trupulleikar eru íkomnir tykkara millum, ella avbjóðingarnar hjá tilflytaranum tykjast ov stórar til, at tú kennir teg føra/n fyri at hjálpa. Broytingar í tínum egna lívi kunnu eisini gera, at tú ikki longur hevur tíð ella umstøður at vera sjálvboðin. Tað kunnu vera nógvar orsøkir til, at sambandið ikki kann halda fram. Vit viðmæla, at tit tosa tykkara millum um at enda sambandið, so at tit eru samd um hetta.

Um tú hevur brúk fyri vegleiðing ella stuðli til at enda sambandið, so boða virksemisleiðaranum frá.

**Ráð og vegleiðing**
Tú ert altíð vælkomin at seta teg í samband við tín virksemisleiðara, ið kann veita tær ráð og vegleiðing.

Um vinalag tykkara endar, skalt tú altíð boða virksemisleiðaranum frá. Virksemisleiðarin vil fegin hoyra um tínar upplivingar, so at tað ber til at læra av teimum. Virksemisleiðarin kann eisini hjálpa tilflytaranum at koma í samband við ein nýggjan sjálvbodnan vin, um vinurin vil tað. Somuleiðis kanst tú gerast sjálvboðin hjá einum nýggjum tilflytara ella gerast sjálvboðin innan annað virksemi hjá Reyða Krossi, um tú vilt tað.

> “ Man kann altíð drekka ein drekkamunn og ganga ein túr. Vit hittast ikki hvørja viku, men viðhvørt. Tað noyðist ikki at vera nakað stórt, vit taka tað sum tað kemur. ”

— Sofía, sjálvboðin —

# SAMBAND OG ÁVÍSINGAR

**Reyði Krossur Føroya**
Stiðjagøta 6, 100 Tórshavn.
Tlf.: 283630
redcross@redcross.fo ella
rkvinir@redcross.fo
www.redcross.fo
www.redcross.fo/rkvinir

**Tað eru fleiri aðrir stovnar og felagsskapir, ið bjóða hjálp og vegleiðing, eisini til tilflytarar.**

**Stovnar**

**Útlendingastovan:** utlendingastovan.fo og integration.fo. Tlf.: 357979.

**Integratiónssamskiparin í Tórshavnar kommunu:** facebook.com/Integrationssamskiparin. Tel.: 302058.

**Felagsskapir**

**Kvinnuhúsið:** kvinnuhusid.fo
Ráðgeving og hjálp til harðskapsraktar kvinnur og teirra avvarandi.

**Rættarhjálp Føroya:** raettarhjalpin.fo
Frí løgfrøðiliga hjálp og ráðgeving til einstaklingar.

**Barnabati:** barnabati.fo
Kjattráðgeving og mentorskipan fyri ung.

**Sinnisbati:** sinnisbati.fo
Sjálvboðin áhugafelagsskapur hjá teimum, ið hava sálarsjúku og avvarðandi teirra.

**Berin:** berin.fo
Stuðul og hjálp til børn og ung, sum hava mist ella hava álvarsliga sjúk foreldur ella systkin, og til foreldur, sum hava mist børn/pinkubørn.

**Amnesty International Føroyar:** amnesty.fo
Amnesty vísir á mannarættindabrot í Føroyum og kring heimin, og arbeiðir fyri at betra hesar umstøður.

**Danskir stovnar og felagsskapir**

**Røde Kors:** rødekors.dk

**Røde Kors intranet:** mitrødekors.dk

**Røde Kors' Eftersøgningstjeneste:** rødekors.dk/tracing

**DRC Dansk Flygtningehjælp:** drc.ngo

**Vitanarportalur um trauma:** traume.dk





" Døturnar hjá okkum eru góðar vinkonur og vitja hvørja aðra og spæla saman, tað er gott og gevandi fyri báðar. "

— Armgarð, sjálvboðin vinur —

" Vit eru sera glað fyri at hava góðar vinir her. Tey greiða okkum frá siðvenjum og mentanini í Føroyum. Vit drekka kaffi, bara práta og njóta góða útsýnið. "

— Armgarð, sjálvboðin vinur —

Útgivið hevur:

**Reyði Krossur Føroya**

Stiðjagøta 6

100 Tórshavn

Hesin faldarin byggir á faldaran hjá
Dansk Røde Kors og
Dansk Flygtningehjælp,
sum eitur “Venner Viser Vej”

Forsíðumynd: Barbara Vang

Myndir: Barbara Vang,
Gwenaël Akira Helmsdal Carré,
Ditte Matilda Joensen

November 2023
Útgáva: 1.0

REYÐI KROSSUR FØROYA